

## Rendi á garð

Tað hendi eingin skaði, tá ein kvinna í gjár um 18-tíðina rendi inn í ein garð í Vestmanna við bili sínum. Kvinnan, sum var einsamøll í bilinum, fekk ongan snudd av óhappinum, men bilurin fór nakað illa. Serliga gekk tað út yvir høgra forhjól, og bilurin kundi ikki við egnari hjálp koyra av staðnum. Boð vórðu tí send eftir flytibili at føra skadda bilin til eina bilasølu í Havn, men fyrrapartin í dag stóð bilurin enn í sama stað.




*Føroyska sendikvinnan í Reykjavík, Gunvør Balle, helt áhug averdan fyrilestur í Eysturoyar Vinnulívsfelag seinasta mikukvøld*

ikk eitt nú vina- og kenningarpolitikkurin, sum jú á ein ella annan hátt er góðtikin, tí tað hevur jú gingið væl.

Men tað tykist, sum íslendingar nú vilja taka alt upp at venda, og at teir vilja ganga frá teirri framferð, sum hevur verið, og at teir nú vilja venda heilt upp og niður upp á teirra mátar at gera tað upp á. So talan er í veruleikanum um eina virðisbroyting, sum fer fram í samfelagnum.

Men tað er ikki alt negativt við gongdini í Íslandi kortini. Talan er um eina samansetta mynd við positivum og kveikjandi tingum.

Kendi íslendski stríðsviljin fornoktar seg ikki. Fólk hava niðurarvaðar eginleikar at kempa fyri at yvirliva, og tað kemur teimum til-góða nú. Íslendarar hava ein sera positivan hugburð til lívið og vilja ikki lata seg kúga.

- Tú sær eina rúgvu av sjálvbodnum tiltøkum alla møguliga staðni, har tey royna at fáa tað góða fram, og finna hættir at brúka hetta konstruktivt, segði Gunvør Balle.

Sum dømi nevnir Gunvør Balle íslendska útvarpið. Hon heldur at tað næstan virkar sum hava tey fingið forboð móti at tosa ilt um støðuna, og heldur royna at draga tað positiva fram.

- Tað hevur heilt ófatiliga stóran týdning, at ein so sterkur miðil sum útvarpið klárar at halda hesi linjuni uppi við kveikjandi og uppbyggjandi stíli, so íslendarar gera íløgu í seg sjálvar í hesum døgum heldur enn at hugsa um kreppu, segði Gunvør Balle.

Tað eru nógv onnur dømi um positiva hugburðin hjá íslendingum. Eitt nú bjóðar tannlæknaskúlin fram ókeypis viðgerð, kommunur bjóða ókeypis vitjan í svimjihøllunum fyri arbeiðsleys, og nógv onnur líknandi tiltøk kunnu upplivast í Íslandi í hesum døgum.

### Skjótt báðar vegir

Síðani fyrilesturin hevur val verið í Íslandi, og sum væntað vann sitandi samgonga. Gunvør Balle greiddi frá, at valstríðið í stórum snúði seg um eina virðisbroyting. Íslendingar vildu ganga frá tí gamla kenda, sum hevði givið teimum tað stóra ríkidømið, men sum eisini hevði ført til stóra skrædlið.

Nú hevur samgongan so fingið neyðuga mandatið frá veljarunum, og tí er tað hugsandi, at hon kennir seg tryggari í sínum politikki. Nú eru so heimildir givnar frá fólkinum at fremja skattahækkingar og søkja um ES-limaskap.

Um longdina av kreppuni dugir føroyska sendikvinnan í Reykjavík ikki at siga.

- Tað veldst fyrst og fremst um, hvussu drúgv altjóða kreppan verður. Ímynda vit okkum, at hon rakar botnin í ár, so kann tað ganga rímiliga skjótt at venda gongdini. Líka skjótt tað gekk niðureftir, líka skjótt kann tað ganga upp aftur. Tað er fyrimunurin við einum lítlum, fleksiblum búskapi, at tað gongur skjótt báðar vegir, segði Gunvør Balle.

Hon heldur, at tað er mangt, sum talar fyri, at Ísland kann koma skjótt fyri seg, men tað veldst um mangt ymiskt, og saman um tikið er tað vónleyst at geva nakað ítøkiligt boð um hetta.

# Krevja milliónir inn ólógliga

**Tað er vorðið alt meiri vanligt, at fyritøkur og handlar krevja ómaksgjald fyri at skriva út rokningar, men tað finst eingin heimild fyri hesum í lógini. Heldur eingin heimild er fyri rykkjaragjøldum**



*Tað verða nógvar milliónir kravdar inn frá fólki um árið uttan heimild*

KUNDAGJØLD

*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*

Vit kenna tað øll. Vit gloyma at gjalda eina rokning, og so fáa vit ein rykkjara, og samstundis verður kravt eitt rykkjaragjald, ofta 50 krónur.

Hetta góðtaka vit, og so rýkur ein 50-krónuseðil eyka við í pottin, tá rokningin verður goldin. Men hetta eru pengar, sum fyritøkur og handlar onga heimild hava fyri at krevja inn.

Nú tykist tað gerast alt meiri vanligt, at fyritøkur og handlar taka ómaksgjald fyri at skriva út rokningar, men heldur ikki fyri hesum finst nøkur heimild.

Tað váttar ein sakførari, Sosialurin hevur tosað við.

- Eg kenni til ítøkilig dømi, har fyritøkur hava kravt ómaksgjald fyri at skriva út eina rokning. Men tað finst eingin heimild í lógini, sum loyvir hesum, og tí er tað pr. definitión ólógligt, sigur sakførarin.

Hetta er kortini ikki heilt vanligt enn millum fyritøkur, men rykkjaragjald er nakað, sum hevur verið nýtt í mong ár. Heldur ikki fyri hesum finst nøkur heimild, men fólk flest vita hetta ikki, og góðtaka tí hesi rykkjaragjøld.

Nú nýtist hetta ikki vera nakað odiøst. Tað kann jú líka skjótt vera, at fyritøkur og handlar ikki vita betur enn at tey hava neyðugu heimildirnar. Men hinvegin finnast eisini uttan iva fyritøkur, sum við beráddum huga skriva hesi ómaksgjøld á, sigur sakførarin.

### Snýr seg um milliónir

Sakførarin, Sosialurin hevur tosað við, sigur, at fólk yvirhøvur vita ikki, at hesar heimildir ikki finnast í føroyskari lóggávu.

- Fólk, sum á einhvønn hátt handla í Danmark, kenna hesi ómaksgjøld haðani. Og í Danmark finnast neyðugu heimildirnar, men tað eru ikki somu lógir galdandi í Føroyum, sigur sakførarin.

Hinvegin ivast hann eitt sindur í, um tað eru versnandi tíðirnar, ið fáa handilsfólk at finna nýggjar inntøkumøguleikar.

- Tað kundi jú hugsast, at serliga í góðum tíðum gjørdi ein 100-krónuseðil ikki nakran mun, og tí guldu fólk bara uttan at hugsa nakað um tað. Í verri tíðum hugsa fólk kanska meira um tað. Og hjá fyritøkunum er tað jú ikki neyðturviliga so, at tey royna at lumpa pengar úr fólki ólógliga. Allarhelst finnasts fyritøkur, sum hugsa, at gongur tað, so gongur tað, men hetta er neyvan galdandi fyri tey flestu, sigur sakførarin.

Við einum einfaldum roknistykki sæst, at talan verður um milliónir, sum á henda hátt verða kravdar inn uttan heimild. Siga vit, at ein fyritøka skrivar út 30.000 rokningar um árið og krevja eitt ómaksgjald fyri rokningina á 30 krónur, stendst ein meirinntøka av hesum á 900.000 krónur. 1,5 millión, um ómaksgjaldið er 50 krónur. Og tá er rykkjaragjald ikki tikið við.

Men ómaksgjøldini eru ikki einastu pengar, sum verða kravdir inn uttan heimild.

- Í allarflestu førum krevja fyritøkur eina rentu, sum liggur langt oman fyri loyvda markið, sigur sakførarin.

Við hesum upplýsingum er ikki ilt at ímynda sær, at fyritøkur og handlar krevja fleiri milliónir krónur inn frá fólki um árið, uttan at heimild finst fyri hesum.

- Hetta er kortini ikki eitt revsimál, sum tveitur fólk í fongsul, men av tí, at eingin heimild finst fyri hesum innkrevjingum, eru tær ikki lógligar. Tí kunnu fólk eisini nokta fyri at rinda ómaks- og rykkjaragjøld, sigur sakførarin við Sosialin.